## Stóratjørn aftur útsett



Fíggjarkreppan ger, at tann stóra Stóratjørn-verkætlanin er útsett. Stóratjørn er ein føroysk verkætlan, og fíggjarkreppan í Íslandi hevur onga ávirkan á hana, hóast íleggjarin býr har, tí Jákup á Dul Jacobsen hevur virksemi í nógvum londum, sigur útvarpið hjá Kringvarpinum. - Men tað er púra greitt, at tað er vónleyst at fáa fígging til Stórutjørn nú, sigur stjórin, Bárður Nielsen, við útvarpið. Hann ásannar, at Stóratjørn framvegis er ein verkætlan, men at hon verður enn eina ferð útsett. Bárður Nielsen torir ikki at koma við nøkrum boði uppá, nær farast kann undir byggingina. Men støðan í Íslandi, har sum íleggjarin í Stórutjørn, Jákup á Dul Jacobsen, býr, hevur ikki ávirkað verkætlanin, sigur Bárður Nielsen við Kringvarpið.

# Ísland sum sosialistiskt samfelag





*Sambært Rósu Eyvindardóttir er einasta vón fyri Ísland, at kapitalisman og neo-liberalisman verða slept, og ein sosialistisk skipan sett í staðin*

**Eg mótmæli fyri at vit íslendingar skulu sleppa kapitalistisku og neo-liberalistisku skipanini og seta á stovn eitt sosialistiskt samfelag í Íslandi, sigur Rósa Eyvindardóttir úr Reykjavík við Sosialin og Rás2**

**Reykjavík:** - Tað, sum eg fyrst og femst mótmæli er, at vit hava eina neo-liberalistiska og kapitalistiska skipan í Íslandi. Avleiðingina av hesum síggja vit í dag. Húsagangur aftan á húsagang og eina stjórn, ið ikki virkar, og sum ikki hevur virkað seinastu árini, sigur Rósa Eyvindardóttir.

Hon sigur, at feilurin liggur í tí veruleika, at Ísland hevur eina høgravenda stjórn, sum bara hevur áhugamálini hjá teimum vælbjargaðu í huga.

- Og tað eri eg harðliga ímóti. Eg vil hava eitt sosialistiskt samfelag, har øll eru so eins sum gjørligt, og harvið sleppa undan slíkum støðum, ið vit eru í í dag, og sum ganga út yvir meg og onnur við, sigur Rósa Eyvindardóttir.

Hon segði, at bankarnir hava lánt útlendskan kapital fyri at gera íløgur uttanlands.

- Teir hava keypt Magasin og Illum og hava annars gjørt íløgur í alt møguligt uttanlands. Tak bara mín banka, sum er Glitnir. Teir hava sett pengar í líkt og ólíkt, og nú noyðist eg at gjalda fyri teirra tap, sigur Rósa Eyvindardóttir.

Hon vísir á, at avleiðingarnar fyri hana eru, at hon nú gjøgnum tann skattin, hon rindar, er við til at afturgjalda skuldina hjá Glitnir.

### Lánini dýrka

Sjálv er Rósa Eyvindardóttir lesandi í Danmark og fær lán og stuðul frá íslendska statinum. Men kreppan hevur gjørt, at hon ikki í dag kann flyta íslendskan pening úr Íslandi til bankar í Danmark.

- Og um eg var í Danmark í løtuni, so hevði eg kanska als ongar pengar havt og hevði kanska verið noydd at gevast við lesnaðinum og fingið mær arbeiði í staðin, sigur Rósa Eyvindardóttir.

Hon hevur eisini kent sviðan av fíggjarkreppuni á annan hátt.

- Eg havi eisini lán í húsum mínum, og tey lánini eru farin upp, so nú skal eg rinda tríggjar milliónir meiri, enn eg gjørdi framman undan.

Rósa Eyvindardóttir er kortini í teirri hepnu støðu, at hon hevur leigarar, so har fær hon eitt gott íkast til lánið.

- Men nú veit eg ikki. Halda lánini fram at hækka, verða tey til endans størri enn húsini eru verd, og so komi eg rættiliga í knípi, sigur íslendska kvinnan.

### Velja røttu fólkini

Rósa Eyvindardóttir hevur kortini einki boð upp á, hvussu long tíð skal ganga, áðrenn viðurskiftini aftur verða normal.

- Tað, sum haldi er loysnin upp á trupulleikan, er, at vit sleppa okkum av við kapitalistisku skipanina og neo-liberalismuna og í staðin seta í verk eina sosialistiska skipan. Síðani skulu bankarnir tjóðartakast saman við teimum fyritøkum, sum eru ringast fyri. Um vit bara loysa kreppuna ad hoc nú, so fer ikki at ganga long tíð fyrr enn alt fer út at koyra aftur. Og IMF er heldur ikki nøkur loysn, tí tað er bara eitt framhald av tí, sum vit hava havt, sigur Rósa Eyvindardóttir.

Hon hevur kortini ikki stórar vónir um, at hon fær sín vilja í hesum málinum.

- Tað hevði verið deiligt, um íslendingar nú kundu vaknað og sagt, at nú vilja vit hava broyting. Nú gongur tað út yvir okkum, so nú vilja vit hava okkurt nýtt. Men vit hava jú demokrati í Íslandi, og kunnu vit bara finna út av at velja fólk inn í Altingið, sum tað er skil í, so hevði eg verið bjartskygd, sigur Rósa Eyvindardóttir við Sosialin og Rás2.

# Eiga at venda okkum til Noregi



*Formaðurin fyri íslendska andstøðuflokkin, Vinstri-Grøni Flokkurin, Ögmundur Jónasson, heldur, at loysnin upp á álvarsligu fíggjarkreppuna skal finnast í norðurlendsku grannalondunum og helst í Noregi*

**Ögmundur Jónasson er floksformaður fyri Vinstra-grøna flokkin í Íslandi og næstformaður í pensjónsgrunninum hjá fakfelagnum fyri alment ansett**

**Reykjavík:** - Kreppan er sera, sera álvarsom, men vit hava ikki sæð avleiðingarnar av henni enn. Talan er jú um eina domino-effekt, sum spjaðir seg í vinnulívinum, og í hvønn mun virkir fara at missa síni arbeiðir og í hvønn mun fólk missa sítt arbeiði, tað vita vit stutt sagt ikki enn, sigur Ögmundur Jónasson, altingslimur.

Hann sigur, at tað verður neyðugt hjá Íslandi at fáa hjálp uttanlands, og í løtuni gongur kjakið upp á, hvar teir skulu venda sær.

- Talan er um, at russarar vilja lána okkum stórar upphæddir, IMF er komið til Íslands og tað eru fleiri sum halda, at vit skulu venda okkum til teirra. Men sjálvur meini eg, at tað eru norðurlendsku londini, vit skulu venda okkum til, teir standa okkum nærmast. Og tað er kanska Noregi við sínum mongu oljupengum, sum er mest upplagda málið, tað er so mín meining, sigur Ögmundur Jónasson.

Hann og flokkur hansara sita í andstøðu, men hann sigur, at tað stórt sæð er semja í altinginum, tá tað snýr seg um útlandið.

- Vit eru til dømis ógvuliga samdir, tá tað kemur til bretsku innifrystingina av virðum hjá íslendskum fyritøkum í Bretlandi, sigur Ögmundur Jónasson og sipar til afturlatingina av íslendskum bankum í Bretlandi við álvarsomum avleiðingum í Íslandi.

### IMF ov stór krøv

Hann sigur, at tað verður tosað um, hvørt Ísland eigur at leggja sak ann móti bretsku stjórnini orsakað av hesum.

Men á øðrum økjum er semjan ikki so stór, serliga tá tað kemur til spurningin, hvar Ísland skal venda sær fyri at fáa nýggjan kapital inn í fíggjarligu skipanina.

- Summi meina, at vit eiga at fara til IMF, men tað líkar mær ikki. IMF fer at seta stór og umfatandi krøv, fyri at hjálpa. Fyri tað fyrsta fer IMF altíð at syrgja fyri, at altjóða kapitalurin fer at fáa sína skuld endurgoldna. Fyri tað næsta verða treytir settar fyri, hvønn politikk vit skulu føra, sigur Ögmundur Jónasson.

Hann vísir til, at krøv fara at verða sett til privatiseringar av almennum stovnum, til dømis innan heilsuverkið

- Somuleiðis hevur mann eisini sæð fyrr í tíðini, at krøv eisini hava verið sett fram um at privatisera orkusektorin, sigur Ögmundur Jónasson.